/

Landsstýrismálanevndin
C/o Løgtingi
Tingusvegur
Tórshavn
Attn. Heidi Petersen, formaður.

Vágur 28.06.2008

**Kæra til landsstýrismálanevndinda av landsstýriskvinnuni ið umsitur samferðslumál – Helenu Dam av Neystabø. – viðvíkjandi handfaringini av málinum um játtan av Kr. 8,7 mill til dokking og umvæling av stabilisatorunum á M/F Smyril.**

Undirritaði vil hervið heita á landsstýrismálanevndini um at kannað um landsstýriskvinnan hevur umsitið og handfari hetta mál á haldgóðan hátt , samsvarandi reglunum um ábyrgd landsstýrismanna..

Orsøkin til hetta er, at undirritaði metir at hetta málið átti at verið avgreitt saman við fíggjarlógini tí tað hevið skund - og ikki drigið út og komið til viðgerðar á tann hátt sum tað bleiv eftirfylgjandi– tí bæði landsstýriskvinnan og umsiting hennara vistu at tað var eitt mál í hevði skund , bæði til at fáa skip til vega at seta inn ístaðin fyri Smyril meðan hesin var í dokk og fyri at fáa neyðuga pláss til dokking av Smyrli í oktober.

Longu 14 maj gjørdi stjórin á Strandfaraskipum landsins greitt at skipið mátti í dokk og tann 21. maj var yvirlit yvir kostnaðin saman við frágreiðing um málið sent til Landsstýrikvinnuna og umsiting hennara .

sí viðhefta tilfar sum undirritaði hevur fingið innlit í .

Á fundi við fíggjarnevndina er komið framm at málið bleiv nevnt, - men hóast hetta so kom málið ikki við sum játtan á fíggjarlógini sum tá var til viðgerðar, av teirri einklu orsøk at landsstýriskvinnan ikki fór formliga rætta vegin við málinum – nevniliga umvegis fíggjarmálaráðið, sum síðani hevði fingið málið til viðgerðar saman við fíggjarlógini.

At landsstýriskvinnan einans 10 dagar eftir at løgtingsfíggjarlógin er samtykt kemur við fíggjarnevndarskjalið og biður um tær Kr . 8,8 milliónirnar til Smyril, kann ikki sigast at verða anna enn margháttligur arbeiðsháttur , sum eg væl skilji at fíggjarnevndin hevði trupult við at góðtakað og avvísti fyrstu fer málið kom til nevndina.

At undirritaði tók málið uppaftur eftir fund við stjóran á stovninum , og hareftir tók samband við løgmann og bað hann kallað løgtingið saman, - er einasta orsøk til at málið koma aftur í fíggjarnevndina og bleiv avgreitt .
Um hetta ikki var gjørt so hevði málið ligið súlta til eftir ólavsøku og tá hevði skipið ikki sloppið í dokk í vetur og avloysari skip heldur ikki verið tøkt, ti freistin at játtað charturin av avloysaraskipið var settur til endan av viku 26.
Hetta hevði verið ikki minni enn ein skandala fyri bæði vinnu og ferðandi til og úr Suðuroynni í vetur.

3 0. JUN. 2008

Løgtingið j. nr. 7.13-20080011 /

Undirritaði metir at landstýriskvinnan hevur misrøkt sínar skyldur í hesum málinum og heiti eg tí á landsstýrismálanevndina um at takað málið til viðgerðar.

Virðingarmest

Johan Dahl, løgtingsmaður